Televarpið
Fleiri rásir - einki roks

Á Kanal5 fríggjakvøldið kl. 22.30



*Hóast tað er langt frá Irak til Hollywood, so merkir fundið av Satan-skulpturinum skelkandi broytingar hjá nógvum persónum*

# The Excorcist

Í bakandi hitanum í Irak eru fleiri hundrað fornfrøðingar í ferð við stóran útgrevstur, tá alt brádliga fer upp at kóka. Nakrir av arbeiðsmonnunum hava funnið ein løgnan lítlan skulptur, og ein gamal prestur, faðin Merrin, verður biðin um at koma á staðið. Skulptururin vísur seg at vera ein ímynd av devlinum sjálvum, og skjótt skal hesin vísa seg at fáa ávirkan á hópin av mannalagnum.

Í Wasington um sama mundið er filmsstjørnan, Chris MacNeil, í ferð við at gera upptøkurnar til nýggjasta film sín lidnan. Hon er fráskild og býr í løtuni saman við 12 ára gomlu dóttur sínari, Regan, og skrivara sínum, Sharon.

Sum so hevur hon eina ógvuliga róliga tilveru, og hon verður við eitt sannførd um, at dótturin er gitin av illum andum. Hon vend-ir sær til faðir Karras í síni neyð, men hann er sjálvur nakað deprimeraður, nú mamma hansara er deyð, og tí roynir hon ístaðin at fáa fatur á fremsta andaruddaranum í heiminum. Nevnliga tí sama faðir Merrin, sum varð boðsendur, tá fornfrøðingarnir í Irak funnu skulpturin av Satan.

Men tað verður so sanniliga ikki bara sum at siga tað, tá Merrin lærir lítlu gentuna at kenna. Satan sjálvur er sterkur, og tó at Merrin hevur drúgvar royndir, sum hann hevur vunnið sær gjøgnum alt lívið, so tykist hetta vera truplasta uppgávan, sum hann nakrantíð hevur møtt.


*Ellen Burstyn hevur ein av høvuðsleiklutunum sum filmsstjørnan, Chris MacNeil*

The Excorsist er ein av stóru klassikarunum í alheims filmssøguni, og er tað William Peter Blatty, sum hevur skrivað bókina handan handritið. Hugskotið til bókina fekk hann, tá hann í 1949 — tá var hann ein ungur lesandi í Maryland — hoyrdi um ein 14 ára gamlan drong, sum var gitin av illum andum.

Tjúgu ár seinni fór hann í holt við skaldsøguna, sum í stóran mun er íbyrt av hugmyndini um æviga stríðið hjá tí góða móti tí ónda. Saman við William Friedkin fór Blatty nakað seinni undir at filmatisera skaldsøguna, sum altso gjørdist ein av teimum heilt stóru klassikarunum. Ikki færri enn 10 Oscarnomineringar fullu filminum til lut, og úr hesum fingu Blatty og Friedkin hvør sín Oscar.

Í leiklutunum í filminum síggja vit millum onnur Ellen Burstyn, Max von Sydow, Jack MacGowran, Jason Miller, Kitty Winn og Lee J. Cobb.

Saman við Friedkin og Blatty vóru hesi við hesum filminum við til at grundfesta eitt heilt nýtt slag av ræðufilmum, har okkultisma og tað ókenda handan tilveru okkara varð sett í fokus, og tó at filmurin fyrstu ferð varð sýndur í 1973, so gjørdi hann sína ávirkan galdandi langt upp í áttati- og nítiárini. Og fyri ikki so langari tíð síðani kom so eisini ein nýggj versión av filminum, nevnd directors Cut.

Filmurin verður sýndur á Kanal5 fríggjakvøldið kl. 22.30


*12 ára gamla Regan tykist vera sett av illum andum, og tí leitar mamman sær hjálp hjá teimum fremstu andaruddarunum í heiminum*

Fríggjadagur kl. 16.03:

## The London bug

Elisa Heinesen, Kristina Sørensen og Dánjal Mariusarson búgva øll í London. Dánjal og Kristina lesa ávíkavist ferðavinnu og dans, Elisa arbeiðir sum sniðgevi. Sendingin varð fyrru ferð send 9. apríl.

Leygardagur kl. 19.05:

## Leygarkvøld í Atlantis

Komandi leygarkvøld verður onnur av fýra undirhaldssendingum beinleiðis úr Atlantis í Klaksvík. Á skránni verður prát, undirhald og musikcafé. Gesturin verður Ólavur Samson, ið hevur nógv at siga frá, eins og aðrir gestir eisini støkka inn á gólvið.

Øssur Hentze hevur spælt sjónleik og verið partur av eitt nú Norðoyastevnuteitinum í nógv ár. Leygarkvøldið verður hann enn einaferð á palli. Eisini verður nomið við skemt sum fyribrigdi, íblástur og fyrimyndir.

Á musikcaféini vitjar Mása Tróndheim, og onki undirhaldskvøld úr Atlantis uttan áskoðarar og orkestur. Orkestrið verður mannað av Magna Husgaard, tangentar, Mikkjali Hvannastein, guitar, Eyðuni Nolsøe, bass, og Jens Paula Joensen, trummur. Vertur verður Gunnar Nolsøe.

Atgongumerki fáast á Shellstøðini í Klaksvík og undan filmsýningunum í Atlantis.

Mánadagur kl. 19.00:

## Smuglarar

Útvarpið fer mánadagin undfir nýggja framhaldssøgu. Tað er skaldsøgan Smuglarar eftir norðmannin Arthur Omre. Hendingarnar fara fram í 1920-unum, tá ið brennivínsbann ráddi í Noregi. Søgan lýsir fátækradømið og tátíðar útvegir at vinna sær pengar á lættan hátt við sprittsmugling. Mest snýr bókin seg um ein byggifrøðing, sum av tilvild gerst smuglari og kemur í klandur við samfelagið. Spælið er ikki bara spennandi, men eisini vandamikið, og skaldsøgan Smuglarar er spennandi sum ein krimibók. Jákup í Skemmuni týddi.



FILMSTEIGURIN

# The Terminal

Viktor Navorski er sleppur ikki úr stað. Samstundis sum hann er ávegis tvørtur um Atlantshavið, er borgarakríggj brosti á í landi hansara, og tískil er visum hansara til USA afturtikið. Samstundis eru landamørkini stongd, so heim sleppur hann heldur ikki. Viktor verður soleiðis tvungin inn í eitt umsitingarligt limbo, har hann verður noyddur at sita í transit-høllini á JFK flogvøllinum. Í dagar. Vikur. Mánaðir.

Og Viktor verður bara verandi. Hann byggir sær eina tilveru, har hann ikki bert búsetur seg í einum horni á flogvøllinumk. Hann lærir seg eisini enskt, fær starv á flogvøllinum og fær eisini vinir millum hini starvsfólkini. Soleiðis er tað bert trygdarovastin, Frank Dixon, sum ikki vil hava hann har, men hann ger so eisini tað, sum hann er mentur, til tess at forða hesum. Men Viktor bara bíðar, og tolin trívst. Sjálvt kærleikin kemur jú til tann, sum bíðar.

Tom Hanks hevur leiklutin sum Viktor Navorski, sum í filminum ger marruna um at sita fastur á einum flogvølli til veruleika. Stanley Tucci hevur leiklutin sum Frank Dixon, og Catherine Zeta Jones er Amelia. Flogternan, sum í Viktor finnur ein góðan vin. Steven Spielberg leikstjórnaði filminum.









Frumsýning

Fríggjadagin 17.09. kl. $20^{30}$ Fríggjadagin 17.09. kl. $23^{15}$
Leygardagin 18.09. kl. $20^{30}$ Leygardagin 18.09. kl. $23^{15}$
Sunnudagin 19.09. kl. $19^{30}$ Sunnudagin 19.09. kl. $22^{15}$

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**

**HAVNAR BIO**
P Tlf. 31 19 56 P
www.bio.fo




Undanfrumsýning

Fríggjadagin 17.09. kl. $21^{00}$ Leygardagin 18.09. kl. $21^{00}$
Sunnudagin 19.09. kl. $22^{15}$




Fríggjadagin 17.09. kl. $23^{30}$ Leygardagin 18.09. kl. $23^{30}$
Sunnudagin 19.09. kl. $19^{00}$




**Við danskari talu – Billettprísur: 55,- kr.**

Fríggjadagin 17.09. kl. $17^{00}$ Fríggjadagin 17.09. kl. $18^{30}$
Leygardagin 18.09. kl. $17^{00}$ Leygardagin 18.09. kl. $18^{30}$
Sunnudagin 19.09. kl. $17^{30}$




**Við enskari talu og donskum teksti – Billettprísur: 55,- kr.**

Fríggjadagin 17.09. kl. $19^{00}$ Leygardagin 18.09. kl. $19^{00}$
Sunnudagin 19.09. kl. $17^{00}$